# JobMatch skapti ítøkilig úrslit



**Vikuskiftið á Norðuratlandsbryggjuni var sett av til føroyskar fyritøkur, stovnar og útisetar. Úrslitið var millum annað 30 ítøkilig starvstilboð.**
**– At fáa føroyskar útisetar heimaftur er ein umfatandi verkætlan, men við JobMatch hava vit sett spakan í, sigur Katrin I. Jacobsen, fyrireikari**

VINNA
*Orð: Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen / grifla.com*

**Norðuratlantsbryggjan, Keypmannahavn:** Starvsstevnan JobMatch 2008 var fríggjadagin og leygardagin. Starvsstevnan varð hildin á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn, og har vitjaðu 300 føroyskir útisetar.

Hesir vórðu kunnaðir um starvsmøguleikar í Føroyum, og høvdu eisini møguleika at kunna fyritøkur um seg, og soleiðis finna út av, um nakað samstarv millum fyritøku og útisetan kundi spyrjast burturúr. Og tað kann tað, vil leiðarin fyri verkætlanina JobMatch, Katrin I. Jakobsen, vera við.

### Kvalifiserað arbeiðsmegi

Fleiri enn 300 JobPrát vóru á JobMatch. Eitt JobPrát er eitt slag av óbindandi starvssamtalu millum einstøk vitjandi og fyritøku ella stovn.

– 75 prosent av teimum vitjandi, sum fyritøkurnar hava havt JobPrát við, er nakað, sum tað ber til at arbeiða víðari við. Katrin I. Jakobsen leggur aftrat, at av hesum eru fleiri lesandi og eru sostatt ikki í umbúna til starv heima í Føroyum í løtuni, men vera tað seinni.

Um tey flyta heim og fáa starv í Føroyum er ein onnur søga. Men ein sannroynd er tað tó, at 30 ítøkilig starvstilboð eru eitt beinleiðis úrslit av JobPrátunum um vikuskiftið.

– Og fyritøkurnar siga sum heild, at tey hava tosað við kvalifiseraða arbeiðsmegi, og hava ikki spilt tíðina hesar báðar dagarnar, sigur Katrin I. Jakobsen.

### Grundarlag fyri endurtøku

Sum skilst eru luttakandi fyritøkurnar nøgdar við starvsstevnuna á Norðuratlantsbryggjuni. Fyrireikararnir lata eisini væl at. Hóast fríggjadagurin ikki var eins væl vitjaður og ætlað, so hugdu nógv fólk framvið leygardagin, so samumtikið eru tey nøgd við talið at vitjandi gestum. Enn er kortini eingin avgerð tikin um, um JobMatch 2008 er fyrsta og seinasta starvsstevnan av hesum slag.

– Eg meti tó, at grundarlag er fyri at endurtaka hetta tiltak, soleiðis at vit møguliga hava JobMatch einaferð árliga, sigur verkætlanarleiðarin fyri JobMatch.

Katrin I. Jakobsen sigur víðari, at JobMatch er bara ein liður í arbeiðinum í at fáa útisetar heimaftur.

– Men við JobMatch er spakin onkursvegna settur í arbeiði, metir hon.

### Dyrgja eftir hjúnafeløgum

JobMatch 2008 var í høvuðsheitum ætlað føroyskum útisetum. Kortini vóru framløgurnar, ið fyritøkurnar høvdu á uppvørpu, á donskum. Tey, ið hildu fyrilestrarnar løgdu eisini altíð fyri við at spyrja, um øll skiltu føroyskt – svarið var altíð: »Ja!«.

– Tað vóru hendinga vitjandi, sum ikki vóru føroyingar, men restin tosaði alt føroyskt, ásannar Katrin I. Jakobsen.

– Sjálvandi er tað eisini brúk fyri útlendingum í Føroyum, sum koma við eini øðrvísi bakgrund enn ta, føroyingar vanliga hava. Tí valdu vit eisini at lata upp fyri møguleikanum, um at hava fyrilestrarnir á øðrum máli enn føroyskum. Og útlendingar er eisini ein møguligur málbólkur, vit fara eftir seinni, sigur Katrin I. Jakobsen. Her nevnir hon, at serliga áhugavert er at koma í samband við útlendskar hjúnafelagar hjá føroyskum útisetum.

– Tí tað er ofta hesir, sum eru ein partur av orsøkini til, at ikki allir útisetar okkara koma heimaftur, heldur Katrin I. Jacobsen.

Alt hetta kemur tó til umrøðu um tvær vikur, tá fyrireikarar og umboð fyri stovnar og fyritøkur fara at eftirmeta JobMatch.

# Miðfyrisitingin ynskir økt samband við lesandi



*Hóast myndin sigur nakað annað, so vóru fleiri framvið í básinum hjá Miðfyrisitingini, og sambært Kristiannu Sjóvará, eru tey væl nøgd við luttøkuna*

**Tað eru ikki bara útbúgving fólk, ið eru áhugaverd fyri Miðfyrisitingina. Fólk undir útbúgving eru eisini áhugaverd, tí hesi kunnu skriva høvuðsuppgávu sína í samstarv við okkum, og tað hevði gagnað bæði ráðum og lesandi**

Kristianna Sjóvará er deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni. Hana hittu vit á básinum hjá Miðfyrisitingini til eitt stutt prát.

– Vit vilja fegin gera vart við, at Miðfyrisitingin hevur fleiri spennandi størv, og tað hevur eisini eydnast okkum, metir hon. Hetta grundar hon á, at tey hava havt fleiri góðar prát. Bæði sokallað JobPrát, men eisini bara við fólk, sum stukku inn á gólvið í teirra bási.

Í mun til onkrar av hinum fyritøkunum, so hevur Miðfyrisitingin ikki bara áhuga í liðugt útbúnum fólki.

– Vit ynskja eisini at koma í samband við fleiri fólk undir útbúgving. Hesi høvdu eitt nú kunnað skrivað høvuðsuppgávu sína í samstarvi og sambandi við okkum. Tað hevði gagnað bæði tí lesandi og okkum, vísir Kristianna Sjóvará á.

Eitt annað, sum deildarstjórin á Løgmansskrivstovuni leggur dent á er, at breiðu útbúgvingarnar, sum fleiri velja í dag, avgjørt eru áhugaverdar í teirra stovni.

– Vit arbeiða tvørtur upp á tvørt, og sóknast eftir fólki við tí arbeiðsháttinum, sum tú bara lærir á einum universiteti. Tí eru tað ikki bara spesialist útbúgvingarnar, ið eru áhugaverdar hjá Miðfyrisitingini, men eisini generalist útbúgvingarnar, sum Kristianna Sjóvará tekur til.

# Vitjandi í arbeiðsørindum



*Hergeir P. Vang vitjaði JobMatch í arbeiðsørindum*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

**Tað vóru ikki bara fólk, sum komu fyri at leita sær arbeiði, ið vitjaðu á JobMatch.**
**– Tað er rætt og slætt í netverksørindum, at eg eri her, sigur Hergeir P. Vang**

**Flest av teimum vitjandi á JobMatch, vóru har fyri at kunna seg um møguligar starvsmøguleikar hjá teimum fyritøkum, ið luttóku. Men tað vóru eisini onnur, sum hava arbeiði og kortini vitjaðu starvsstevnuna.**

**– Eg eri her fyrst og fremst fyri at skapa persónligt samband við fyritøkur, ja, rætt og slætt í netverksørindum, sigur Hergeir P. Vang, sum millum annað er við at reka heimasíðuna arbeidi.fo, ið er ein nýggjur arbeiðsportalur.**

**– Sjálvandi vil eg eisini kanna sjálvt tiltakið, sum eg haldi er serstakliga gott, og har vit heilt víst umhugsa at vera við, um tað verður aftur einaferð seinni, sigur Hergeir P. Vang.**

**– Men vit leita eisini eftir meiningum frá fólki, um okkara virksemi. Tað hava vit fingið frá bæði einstaklingum og fyritøkum, so í so máta eru vit eisini glaðir fyri JobMatch, sigur Hergeir P. Vang, ið saman við øðrum millum annað rekur arbeiðsportalin arbeidi.fo**